# KUNNING FRÁ NEVNDINI

# UM

# FÍGGJARGONGDINA SÍÐANI ÁRSAÐALFUNDIN

**November 2010**

# KUNNING FRÀ NEVNDINI

**um**

**fíggjargongdina síðani seinasta ársaðalfundin**
**(jbr. viðtøkurnar, § 3, stk. 13 b og § 4, stk. 12 b).**

## Formæli og niðurstøður

Eftir viðtøkunum hjá SEV skal nevndin lata eykaaðalfundinum á heysti eina frágreiðing um búskapargongdina síðani seinasta ársaðalfund.

Umframt gongdina síðani ársaðalfundin er valt niðanfyri at greiða frá gongdini alt árið higartil og at meta um væntaða úrslitið við árslok.

Niðanfyri eru víst rakstrartøl sambært bókhaldinum fyri tíðarskeiðið januar – september 2010, og hvussu nógv prosent av ársfíggjarætlanini eru brúkt við endan av september. Bókingarnar eru periodiseraðar, men ikki grannskoðaðar.
Harafturat skal í tølunum fyri inntøkur takast fyrivarni fyri ársuppgerð av elkundunum sambært avlestrar, sum verða gjørdir í desember og sum umfata umleið tveir triðingar av elnýtsluni. Eisini skal roknast við møguligum eftirbókingum.

Sum greitt er frá niðanfyri, verður rakstrarúrslitið í 2010 nakað verri enn roknað varð við sambært uppruna rakstrarætlanini, sum vísti eitt hall uppá 36,6 mió. kr. eftir avskrivingar. Sambært bókhaldstølini fyri fyrstu 10 mánaðirnar av árinum er hallið fyri tað tíðarskeiðið uml. 32 mió. kr., men skal hettar tal takast við fyrivarni, jbr. viðmerkingarnar. Eftir metingunum nú, og sum verða vístar í talvuni niðanfyri í “tillagaðu” fíggjarætlanini, verður roknað við einum halli upp á útvið 52~~54~~ mió. kr. fyri alt árið 2010 eftir avskrivingar. Tað er fyrst og fremst oljuprísgongdin, sum saman við óbroyttum inntøkum hevur verið orsøkin til stóra hallið. Oljuútreiðslurnar verða væntandi einar ~~128~~122 mió. kr. ella ~~meira enn 20~~einar 16 mió. kr. størri enn roknað varð við, tá tillagaða fíggjarætlanin varð løgd fyri aðalfundin í vár.

Samanumtikið kann sigast, at úrslitið fyri 2010 verður alt annað enn nøktandi, fyrst og fremst orsakað av høgum oljuprísum, men eisini av, at elprísirnir í longri tíð ikki eru dagførdir og tillagaðir øktu útreiðslurnar.

## **Rakstrartøl 2009 – 2010 (1.000 kr.)**

| | Roknskapur 2009 | ”Endurskoðað” Fíggjarætlan 01/01-31/12 2010 | Bókað 01/01-30/09 2010 | Brúkt í % av ætlan 01.01 – 30.09.2010 | Mett úrslit fyri 2010 (framskr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| Streymgjald | 260.278 | 256.143 | 200.003 | 78 | 260.000 |
| Fast gjald | 16.380 | 16.369 | 13.746 | 84 | 16.500 |
| Íbindingargjald | 2.094 | 2.000 | 1.080 | 54 | 2.000 |
| Aðrar inntøkur | 1.118 | 1.755 | 157 | 9 | 1.000 |
| **Inntøkur tils.** | **279.870** | **276.267** | **214.986** | **78** | **279.500** |
| Keyp av streymi | 2.699 | 2.900 | 1.534 | 53 | ~~2.3~~2.000 |
| Olja tilsamans | 75.854 | 106.481 | 96.110 | 90 | ~~128~~122.000 |
| Tilfar v.m.excl. anleggsprojekt | 69.757 | 72.117 | 52.805 | 73 | ~~72.117~~76.700 |
| Lønir excl. anleggsprojekt | 62.277 | 65.465 | 48.522 | 74 | 65.465 |
| **Rakstrarútr. tils.** | **210.587** | **246.963** | **198.971** | **81** | **~~267.882~~266.165** |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **69.282** | **29.304** | **16.015** | **55** | **~~11.618~~13.335** |
| Renta og tílíkt | 5.210 | 9.897 | 6.083 | 61 | ~~9.897~~9.000 |
| **Úrslit áðrenn avskr.** | **64.072** | **19.407** | **9.932** | **51** | **~~1.721~~4.335** |
| Anleggsavskrivingar | 54.815 | 56.000 | 42.000 | 75 | 56.000 |
| **Úrslit** | **9.257** | **-36.593** | **-32.068** | | **~~-54.279~~-51.665** |

## **Elframleiðsla og nýtsla**

Í 2009 var elframleiðslan 275,5 mió. kWh, harav vatnorka 92,4 mió. kWh ella 33,5% av framleiðsluni og vindur 15 mió. kWh ella 5,5% av framleiðsluni.

Náttúran broytist frá ár til ár og við henni eisini framleiðslan úr vatni og vindi. Broytingarnar eru bæði upp og niður frá tíð til aðra. Vatnorkuframleiðslan var væl undir meðal í 2009.

Í 2010 verður vatnorkuframleiðslan uppaftur verri enn í 2009. Fyrstu 10 mánaðirnar av 2010 er vatnorkuframleiðslan 16,6 mió. kWh minni samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Høvðusorsøkin til hesa afturgongd í vatnorkuframleiðsluni er at finna í, at Fossáverkið hevur ligið stilt til umvælingar ein stóran part av árinum. Í sama tíðarskeiði var vindorkuframleiðslan uml. 1,3 mió. kWh minni.

T.v.s., at fyrstu 10 mánaðirnir í ár er framleiðslan frá varandi orkukeldum samanlagt uml. 17,9 mió. kWh minni enn sama tíðarskeið í fjør. Hesir 17,9 mió. kWh gera saman við eitt sindur hægri elnýtslu og -framleiðslu, at termiska framleiðslan vaks munandi 10 teir fyrstu mánaðirnir, ella 22,9 mió.kWh.

## Inntøkurnar í 2010

Tað eru tríggir ymiskir faktorar, íð ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV, sum er søla av elmegi.
Hesir tríggir faktorarnir eru:

- Elprísbroytingar
- Broytingar í elnýtsluni
- Forskjótingar ímillum ymiskar kundaprísbólkar

Í fleiri ár á rað er inntøkan vaksin, næstan uttan undantak orsakað av vaksandi elnýtslu. Elprísirnir fyri hvønn kundabólk sær hava verið óbroyttir fram til 1. januar 2008, tá allir elprísirnir hækkaðu 10 oyru/kWh. Bæði í 2009 og 2010 vóru umsóknir frá SEV um loyvi at hækka prísirnar ikki gingnar á møti.

Elnýtsluvøksturin steðgaði í 2009, men framleiðslutølini fyri fyrstu 10 mánaðirnar av 2010 benda á ein árligan vøkstur í nýtsluni uppá 1,8 % í løtuni.
Um hettar verður gongdin restina av árinum, er ilt at meta um, men í løgdu fíggjarætlanini fyri 2011 er roknað við, at vøksturin verður 0,9 % frá 2009 til 2010 og ongin frá 2010 til 2011.
Umleið tveir triðingar av søluni verða gjørdir upp við avlestri hjá kundunum einaferð um árið, og verður tá staðfest, hvat sølan til tann einstaka kundan hevur verið. Avlisið verður í desember á hvørjum ári.

Bókaða inntøkan upp á knappar 215 mió. kr. fram til 30. september 2010 kann ikki beinleiðis umroknast til eina fulla ársinntøku, av tí at umleið tveir triðingar av bókaðu inntøkunum eru grundaðir á akontorokningar, sum verða endaliga uppgjørdar við avlestri um árslok, og at ávísir skeivleikar kunna vera í periodiseringum av akontoratum og inntøkum annars, sum ikki falla javnt mánað fyri mánað.

Út frá frammanfyri nevndu viðurskiftum, uppgerðum higartil, bókaðum íbindingargjøldum, framleiðslutølum o.a. verður mett, at samlaða inntøkan verður helst fyri alt árið 2010 áleið 279,5 mió. kr.

## Útreiðslurnar

### Olja

Útreiðslurnar til oljukeyp eru beinleiðis tengdar at prísbroytingum á heimsmarknaðinum umframt at elnýtslubroytingum og sveiggj í vatn- og vindorkuframleiðsluni.

Oljuprísirnir, sum SEV skal gjalda, eru tengdir at prísnoteringini á oljumarknaðinum og USD-kursinum.
Prísirnir á teirri tungolju, sum SEV brúkar, fylgir marknaðarprísinum, sum hevur verið ógvuliga óstøðugur og hevur havt lyndi at hækka seinastu fimm árini, jbr. yvirlitið niðanfyri yvir oljuprísgongdina 1999 – 2010.
Príssveiggini hava gjørt tað trupult at meta rætt um oljuútreiðslurnar til fíggjarætlaninar seinastu árini. Soleiðis vóru oljuútreiðslurnar undirmettar í fíggjarætlanini fyri 2008, yvirmettar í 2009 og nú aftur í 2010 undirmettar. Í endurskoðaðu fíggjarætlanini, sum varð løgd fyri aðalfundin í apríl í ár, gjørdu broytingarnar frá november 2009 til apríl í ár, at væntaða oljuútreiðslan varð hækkað úr 96 uppí 106 mió. kr.
Nú, íð árið fer at halla, vísir tað seg, at oljuútreiðslurnar helst verða einar ~~128~~122 mió. kr.
Hettar er fyrst og fremst orsakað av hækkaðum oljuprísum, men eisini, sum nevnt frammanfyri, av munandi størri termiskari framleiðslu.

Niðanfyri er ein mynd, sum vísa marknaðar-prísgongdina á tungolju (1% fuel, FOB, NWE), meðal fyri hvønn mánað frá 1. januar 1999 til 12. november 2010.

**Oljuprísgongdin 1999 - 2010**



## Aðrar rakstrarútreiðslur

Útreiðslurnar til rakstur av elverkunum (fyriuttan oljuútreiðslur) og til býtisvirkir og fyrisiting íroknað ymiskar felagsútreiðslur hava samanlagt verið fyrstu 9 mánaðirnar av árinum áleið tað, ið roknað er við í rakstraræltlanini. Tó er nakað óvæntað komið afturat av umvælingarútreiðslum og niðurskrivingum av bókaðum virðum. Talan er um neyðuga umvæling av 6/20 kV transformaranum á Eiðisverkinum og umvæling av avbrenda generatorinum á Fossáverkinum. Bókaðu virðini av partapeningi í og láni til P/F Sewave, tilsamans góðar 4,5 mió. kr. eru niðurskrivað til 0,- sum rakstrarútreiðsla aftaná, at alduorkuverkætlanin er steðgað soleiðis, sum greitt er frá í frágreiðing nevndarinnar um virksemið síðani ársaðalfundin.
Ein ávísur seinleiki er í bóking av hesum m.a. orsakað av, at rokningar kunnu vera seinkaðar í mun til veitingartíðina. Væntast kann tó alíkavæl, at rakstraræltlanin á hesum økjum fer sum heild at halda.

## Renta

Roknað verður við, at nettorentuútreiðslurnar verða áleið, sum ásett í fíggjarætlanini, t.e. knappar 10 mió. kr. Núverandi langtíðarlánini hjá SEV hava fasta rentu í 2010. Í 2010 eru/verða tikin tilsamans 90 mió. kr. í lánum, harav 60 mió. kr. frá Íleggingargrunninum til fígging av Eiði 2 – verkætlanini. Hesi eru til fasta rentu í byggitíðini, og skal rentan endaliga avtalast í 2013.

## Avskrivingar av anleggum

Avskrivingarnar av anleggum eru mettar at vera 56 mió. kr. í 2010.

Anleggsavskrivingarhátturin varð broyttur frá 1. januar 2009, tá myndugleikarnir áløgdu SEV at uppskriva anleggsvirðini og samstundis leingja avskrivingartíðirnar soleiðis, at netparturin hereftir verður avskrivaður yvir 35 ár, vatnorka yvir 50 ár og stóru termisku verkini yvir 25 – 30 ár.
Frammanundan hevði avskrivingarhátturin verið óbroyttur í mong ár. M.a. vórðu dieselmotorar og býtisvirkir avskrivað yvir uml. 15 ár og vatnorkuverk yvir 20 ár. Hettar svarar nøkurlunda til avdráttirnir av teimum lánum, ið upprunaliga vórðu til fígging av íløgunum.

Longda avskrivingartíðin fyri nýggjar íløgur fara, um avskrivingarnar verða lagdar til grund fyri elpríspolitikkinum, at fáa tær óhepnu fylgjur, at so verða ikki ráð til at afturgjalda lánini av nýggju íløgunum líka skjótt sum áður. T.d. skulu lán til vatnorkuíløgur afturgjaldast eftir 50 árum. Hettar fer helst at seta serlig krøv til lánstreytirnar og til endurfíggingarmøguleikar í avskrivingartíðini.

## Íløgur, lántøka og likviditetur

Sambært upprunaligu íløguætlanini fyri 2010 varð roknað við íløgum fyri í alt 106,3 mió. kr.

Nú, ið árið er farið at halla, kann staðfestast, at íløgurnar í árinum verða munandi minni, ella helst ikki meira enn einartilsamans millum 80 og 90 mió.kr. mió. kr.

Tað eru ymisk viðurskifti, sum hava gjørt, at íløgurnar gjørdust munandi minni enn ætlað. M. a. er onki brúkt til vindorku.Vindorka skal bjóðast út, og um SEV fær uppgávuna, verða íløgur gjørdar næsta ár á hesum øki. Heldur ikki verða allar tær 60 mió. kr. til Eiðisverkætlanina brúktar, eins og væntaða íløgan í alduorku verður av ongum.

Samstundis sum íløgumálini í 2010 sum nevnt ikki verða rokkin til fulnar, verður roknað við, at gjaldførið við árslok verður einar 2425 mió. kr. og lánibyrðan av føstu lánunum einar 217 mió. kr. Høvdu íløgurnar verið hægri, varð gjaldførið samsvarandi minni. Møguliga verður innkeyp av eini last av tungojlu flutt soleiðis, at hon fellur til gjaldingar eftir ársskiftið. Tá verður nevnda gjaldførið meira enn 20 mió. kr. størri tann 31.12.2010.

Viðtøkubroytingarnar, sum samtyktar eru at galda frá 1. januar 2009, áseta, at veð-haldsskyldurnar hjá kommununum eru falnar burtur við undantaki av veðhaldi fyri skyldum yvirfyri starvsfólkunum.

Sum nevnt í frágreiðing nevndarinnar til aðalfundin seinasta heyst er virknaðurin av hesum tann, at SEV er vorðið skattskyldugt, og at neyðugt verður at fáa aðra trygd fyri bæði verandi og komandi lánifígging. Verandi lániveitarar hava fingið játtað veð í ognum hjá SEV.
Sambært 10 ára íløguætlanini verða íløgurnar einar tvær milliardir kr. Hettar skal fyri stórsta partin lánifíggjast. Tí verða fíggingarmøguleikar og lánstreytir avgerðandi partar av karmunum í sambandi við at fremja 10 ára ætlanina.

Ein av spurningunum í hesum sambandi er, í hvønn mun stóru broytingarnar, sum hava verið seinastu tvey árini á peningamarknaðinum, ávirka fíggingarmøguleikarnar frameftir.

Sum støðan er í dag verður rátt til at hava neyðuga fígging upp á pláss, áðrenn bindandi avtalur verða gjørdar um størri íløgur.

Tórshavn, tann 27. november 2010

Nevndin fyri SEV